**Magnus Heinason - Túrfrágreiðing**
**Korallir. Túrur nr. 1728**
**Tíðarskeið 15 - 21/6 - 2017**

---

**Fólk frá HAV:** Ebba Mortensen, Poul Vestergaard, Petur Steingrund. Eisini vóru Pål Buhl-Mortensen og Lene Buhl-Mortensen frá Havforskingsinstituttet í Bergen í Noregi við.

**Ábyrgd:** Petur Steingrund, kanningarleiðari.

**Endamál:** Hetta var ein serstakur túrur í samband við eina norðurlendska verkætlan, sum nevnist NovasArk. Endamálið við verkætlanini er at skráseta útbreiðslu av korallum og øðrum viðbreknum verum í norður-eystur Atlantshavi.

**Reiðskapur:** Ein serstøk videoútgerð, har videoupptøkur verða skrásettar, meðan tær eisini verða vístar á skipinum. Talan er um útgerð, sum Havstovan eigur og aðra útgerð, sum er keypt til endamálið.

**Um túrin:** Fóru av Havnini hósdagin 15/6 kl. 13. Vit høvdu umleið 210 favnar av kaðali, og gjørdi hetta, at roynast kundi bert niður á umleið 350 metra dýpi, tá líkindini vóru góð, og annars bert niður á umleið 200 metra dýpi. Avgjørt varð at hava upptøkur, sum vardu 30 minuttir. Vit byrjaðu við at royna útgerðina eystan fyri Nólsoy. Útgerðin riggaði og síðan fóru vit innanvert Sandoyarbanka at filma botnin. Talan var um dýpi frá 200 til 350 metrar. Fóru úteftir í kantinum á dýpinum millum Sandoyarbanka og Suðuroyarbanka. Eftir tað fóru vit til økið sunnan fyri Suðuroyarbanka, sum er kent sum eitt øki við korallum. Løgdu leiðina suður á Munkagrunnin og síðan norðureftir í vestara kanti á Munkagrunninum. Fóru yvir á Føroyabanka og gjørdu upptøkur á tí grunna partinum og annars upptøkur í norðara kanti. Vindurin og streymurin vóru soleiðis, at ikki bar til at royna heilt djúpt, so ein part av tíðini mátti filmast á grynri vatni. Fóru yvirum til økið við Skeivabanka at taka upptøkur, men máttu fara grynri, og á henda hátt hildu vit fram norðureftir vestan fyri Mykines. Løgdu í kantin norður-vestur úr Mykinesi og tók nógvar støðir har. Fóru suðureftir í kantinum mótvegis Skeivabanka seinasta dagin. Tær seinastu tvær støðirnar vórðu tiknar á heimferðini sunnan fyri Mykines og sunnan fyri Vágoy. Vóru á Havnini mikumorgunin kl. 8.

**Fyribilsúrslit:** Upptøkurnar vóru sera klárar og eisini bar til at steðga og hyggja at stillum myndum. Vit sóu korallir á umleið 5 av 53 støðum. Sjey støðir vóru stytri enn 30 minuttir, tí kaðalin var ov stuttur ella tí tað vóru tøkniligir trupulleikar. Vit sóu svampar á nógvum støðum og 19 støðir vístu nógvan sokallaðan ”ost”, sum sipar til ávísar stórar svampar (Mynd 3). Vit sóu til tíðir fisk, mest lítla kongafisk (Mynd 4) og viðhvørt størri fisk so sum longu. Tað var einki at síggja til húsarhaldsburturkast, men tað kom fyri, at gomul lína lá á botni (Mynd 5).

**Nær eru upptøkurnar lisnar inn á teldu:**
Upptøkurnar vórðu goymdar á harddiski so hvørt, sum støðirnar vórðu tiknar.



Mynd 1. Støðirnar, sum vóru góðkendar. 100 m dýpdarkurvar eru vístar umframt 12 fjórðinga fiskimarkið.



Mynd 2.Korallir (*Lophelia*) við sjótrøum (*Paragorgia*) á støð 5, sum var norður av Suðuroyarbanka. Tann livandi parturin av korallunum er hvítur.



Mynd 3. Ostur.



Mynd 4. Lítli kongafiskur svevur í einum svampi.



Mynd 5. Línureiðskapur á botni.

Á Havstovuni 23. juni 2017
Petur Steingrund